# øgn frá eini ALASKAFERÐ



*Eitt fitt, lítið "ground squirrel". Eitt gnagdýr, ið livir í fjallalendi. Minnir kanska nakað um ein íkorna*



*Hatcher Pass við Gold Core Mine – eitt gullnám frá farnu øld*



*Elgmamman gevur kálvinum burturav leyvinum, ið hon hevur fingið fatur á. Hetta er 200 m frá, har vit búgva í East Hall!*



*Bólkur av upprunafólki, ið sýnir fram sang og dans.*

bara slept og hugsaði ikki meira um.

Knappliga kemur róp í, meðan nøkur eru á veg í mini-bussar. Har stendur ein elgur bara 200 m frá East Hall –har vit búgva! Tað er ein mamma við tveimum kálvum! – Vit eru eini 4-5, ið ikki kunnu stýra forvitninum og fara tí varisliga gangandi móti stórdýrunum.....

Jú, har standa tey, nakað inni millum trøini, nær við eina gøtu. Tyggja leyv frá trøunum – ið tey røkka væl til á sínum longu beinum. Vit fara spakuliga nærri. Fara tey at loypa á? Vit fáa tikið okkara myndir, eitt sindur ristandi á hondunum. – Tað vísir seg, at hendan mamman er ikki bangin um sínar kálvar. Teir eru næstan hálvvaksnir,og kanska hugsar hon sum so, at "teir skulu nokk klára seg sjálvar"?

Í hvussu er og ikki, so koma vit til eina frástøðu uppá einar 50 metrar, uttan at nakað hendir. – Enn ein spennandi uppliving í hesum velduga landi – mitt inni í høvuðsstaðnum, Anchorage!

Alaskaferðin, ið bert hevur vart í 8 dagar er við at fáa ein enda. Tað er ótrúligt, at til ber at fáa sætt so nógv uppá so stutta tíð. Ráðstevnan í sær sjálvum var eitt stórt fakligt upplivilsi eisini. Nýggjastu úrslitini eru framløgd innan gransking í einum av minstu fiskunum – men kanska við teim størstu og mest áhugaverdu úrslitunum!

Eitt er tey vísindaligu-fakligu úrslitini ið liva sítt lív, bæði nú og víðari fram.

Eitt annað er, at í samveru við tílík vælútbúgvin og kultiverað fólk fært tú eisini ein hóp av aðrari vitan enn tí fakligu. Tey flestu eru opin og áhugaði í nógvum øðrum enn júst tí fakligu. Tú fært nógv at vita um siðir og skikkir í teirra heimlandi. Hendan vitan verður givin við toleransu, fyriliti og umhugsni. Umfram týdningarmiklu vísindaligu kontaktirnar, verða eisini ymisk vinarbond knýtt, ið lætta um framtíðar samskifti. Við at eygleiða tílík fólk í práti eisini, so gerst tú skjótt greiður yvir, at kanska eitt hitt besta amboðið til linna, frið og samstarv í heiminum er gjøgnum vísindaligt samstarv og upplýsing á øllum stigum. Tú sært fólk frá londum, ið nýliga hava verið í kríggi tosa siðiliga saman. Ja, enntá skemmta og og flenna saman. Til dømis japanar og kinesarar, har tú trúði støðan framvegis var spent; men nei, ongin trupulleiki í hesum fakliga høpi. Heldur ikki uttan fyri fundirnar.

Mín niðurstøða frá hesari stuttu ferð míni í fjarskotna Alaska er tí tann, at ein væleydnað vísindalig ráðstevna førir eina rúgvu av positivum tingum við sær.

– Hetta hava helst nógv onnur enn eg funnið útav, og lat meg tí gevast her – sjálvt um hópur av øðrum kundi verið drigið fram.

Tær føroysku kanningarnar av kombikki eru farnar fram á Fiskirannsóknarstovuni, har eitt opið, livandi og inspirerandi fakligt umhvørvi til alt slag av fiskakanningum er at finna. Eg takki teimum hervið mangar ferðir, eins og teimum, ið fíggjaðu kanningarnar: Oljumálaráðnum, Statoil Færøyene A/S og Vísindagrunni Føroya Sparikassa.